UPPLIVINGAR ÚR GERANDISDEGNUM
FRÁ 1907 TIL DAGIN Í DAG

# EIN PORTALUR TIL NÝGGJARI FØROYSKA SØGU

**HUGLEIÐINGAR: Filmur er sterkasti miðil, ið finst, tí hann megnar at skapa eina heilt serliga nærveru og vekja kenslur og uppliving hjá fólki, sum tað er ógjørligt at gera við øðrum miðlum. Tískil kennist filmsfløgan Føroyskar Søgur eins og ein portalur, ið verður latin upp til nýggjari føroyska søgu**

Sum smádrongur elskaði eg at gista hjá ommu mínari í Runavík um vikuskiftini. Karin omma var eitt serligt fólk, ið dugdi ómetaliga væl at siga frá, og minni hevði hon sum fáur. Visti alt um familju, og so minnist eg meg ongantíð hava hoyrt hana sagt eitt øvugt orð um nakran ella nakað.

Har hevði eg eitt friðskjól, um tað gjørdist ov buldrasligt har heima, ella eg bara hevði brúk fyri at vera eitt sindur fyri meg sjálvan, ið ikki altíð var so lætt, tá ein hevði fýra systkin.

Serliga spennandi var at fara aftur um rygglenið í sofaini, har omma goymdi alskyns gomul dag- og vikubløð – føroysk eins væl og donsk. Tað gav mær altíð eina serliga kenslu at sita og granska hesi gomlu bløð, ið kendust eins og ein tíðarlummi ella ein portalur til eina farna fortíð, sum einaferð var livandi nútíð – klæðini, hárið, bilarnir.

Við árunum havi eg eisini upparbeitt ein stóran áhuga fyri dokumentarfilmum, og tískil var tað at rokna sum ein uppgáva, ið var skraddaraseymað til mín, tá eg í februar mánað varð uppringdur og spurdur, um tað hevði verið áhugavert fyri meg at arbeiða við verkætlanini Føroyskar Søgur, ið Eik Banki og danska framleiðslufelagið Substaz Nordisk Film høvdu tikið stig til í felag.

### Spegla okkum í livandi myndum

Uppgávan ljóðaði, at eg skuldi samskipa arbeiðið at savna saman dokumentariskar filmsupptøkum, ið eru gjørdar í Føroyum síðan filmsmiðilin varð uppfunnin, fáa tær yvirspældar til eitt framtíðartryggjað format og síðan seta saman eina filmsfløgu (DVD) burtur úr tilfarinum.

Skjótt gjørdist mær greitt, at gomlu føroysku vikubløðini hjá ommu vóru lítið av miklum, tá eg brádliga sat og hugdi at livandi myndum frá 25. juli 1907, tá ið Fríðrikur 8. steig á land á Kongabrúnni í Havn (tvey ár áðrenn omma mín varð født).

Livandi myndir eru sterkasti miðil, ið finst, tí tær megna at skapa eina heilt serliga nærveru og uppliving hjá fólki, sum er ógjørligt at skapa við øðrum miðlum. Vit kunnu spegla okkum í livandi myndum, og tískil kennist tað ómetaliga forkunnugt at uppliva teir gomlu føroyingar, ið vit einans kenna frá deyðum myndum og søgubókum, verða vaktar aftur til lívs.

Serliga tankin um, at hetta arbeiði fór at vera til gagn fyri núlivandi og komandi ættarlið av føroyingum, tiltalaði meg. Allar yvirspælingarnar fara nevniliga at liggja í savninum hjá Kringvarpi Føroya fyri eftirtíðina, og harvið verður samlaði føroyski mentanararvur á filmi latin upp fyri øllum. Tað fer uttan iva at hava stóran týdning fyri søgufatanina hjá komandi ættarliðum av føroyingum.

### Indiana Jones

Arbeiðið við Føroyskum Søgum hevur ikki einans givið mær møguleikan at pleygað mín søguáhuga og áhuga fyri dokumentariskum filmum. Tað hevur eisini talað til mín innara detektiv ella











ævintýrara. Eg havi til tíðir kent meg sum ein annan Indiana Jones í einari endaleysari jagstran eftir filmsdýrgripum.

Eitt hitt mest forkunnuga filmsfundið bleiv gjørt í Oyndarfirði. Eftir eitt tipp frá einum eldri manni í Havn stóð eg brádliga í gomlu húsunum, ið stórbóndin og handilsmaðurin í Oyndarfirði Klæmint Høgnesen læt byggja í 1856. Tað vísti seg, at yngsti sonur Klæmint, Julius Høgnesen, ið blaðungur flutti til Danmarkar at lesa til apotekara, legði rættiliga fitt av filmstilfari eftir sær, tá ið hann andaðist í 1931. Julius var eftir øllum at døma ein verðinsmaður, ið hevði klárað seg væl og tískil havt atgongd til hópin av hentleikum, sum ikki vóru hvørjum manni beskorið um hetta mundið, millum annað eitt filmsupptøkutól. Við tí hevði hann filmað ferð sína til Føroya í 1930 frá byrjan til enda, og kunnu hesar upptøkur nú upplivast á Føroyskum Søgum undir heitinum »Aftur á slóðina«.

Men eingin Indiana Jones veiðiferð, uttan at ein fella ella eitt forbannilsi er knýtt at dýrgripinum. Vit blivu eitt sindur skakkir, tá ið vit funnu út av, at nakrar av rullunum vóru so gamlar, at tær vóru úr nitratfilmi, ið kann festa í av sær sjálvum, tá ið hitin nærkast teimum 40 stigunum. Hetta visti eg einki um, fyrr enn eg fór inn á Short Cut-filmsverkstaðin í Keypmannahavn við teimum, og allar ávaringarlampur fóru at blinka. Eg varð jarðlagdur, og gomlu, snotiliga kakueskjurnar við 35 mm filmsrullunum, sum systir Julius, Henrietta, hevði havt við sær, tá hon flutti aftur til Føroya í 1945, vórðu skryktar frá mær og blakaðar inn í eitt eldvart nitratskap. Tær rullurnar havi eg havt standandi á skriviborðinum.

Tað skal sigast, at mann gavst at brúka nitratfilm, sum burtur av bleiv brúktur til 35 mm filmar, fyrst í 50unum, tá man fór at brúka organisk evni at gera film úr. So eingin, ið eigur 8 ella 16 mm filmsrullur hevur nakað at bera ótta fyri.

### Tørvur á einum filmsavni

Hóast hvøkkin, so eiga allir føroyingar, sum av sínum einslistum hava varðveitt føroyska filmsarvin gjøgnum ættarlið heima við hús, stórt rós. Eg haldi, at Føroyskar Søgur av álvara hevur varpað ljós á, at tíðin er búgvin til, at vit fáa eitt savn fyri livandi myndir í Føroyum, tí tað er í tøkum tíma, at hetta arbeiði verður gjørt. Fólk eldast, og filmsframvísararnir eru langt síðan gingnir fyri. Tískil brenna nógv fólk inni við gomlu filmsrullunum, ið tey ikki ordiliga vita, hvat tey skulu gera við.

Føroyskar Søgur hava verið eitt gott høvi hjá fólki at fáa yvirspælt filmsrullurnar á eitt nýtt format, ið tey kunnu hyggja eftir, og samstundist hava tey eisini verið ómetaliga glað um at kunna geva sítt íkast til verkætlanina og upplivað, at eitt brúksvirði er í gomlu filmsrullunum, ið hava ligið og savnað dust á loftinum ella úti undir væðingini í nógv harrans ár.

Burtur úr tí rúgvusmikla tilfari er gjørt eitt úrval av fangandi og sjálvstøðugum søgum, ið hava upptikið fólk og havt týdning fyri, hvussu vit liva í dag. Talan er ikki um almennu føroyasøguna, men um løtumyndir úr gerandisdegnum hjá føroyingum seinastu 100 árini. Hetta hevur kanska verið torførasta avbjóðingin, tí í valinum av søgum og filmkutum liggur eisini eitt frával av øðrum.

Í fleiri førum hava vit funnið gamlar filmar, sum í sjálvum sær hava verið smáar søgur, og tískil hevur tað meira verið ein spurningur um at finna okkurt at siga til góðu myndirnar. Besta dømi um hetta er Føroya-filmurin hjá Juliusi Høgnesen. Í øðrum førum hevur avbjóðingin verið at sita við nøkrum filmskutum og roynt at fingið tey sett saman til eina søgu.

### Søgujunkie

Tað hevur havt sínar avleiðingar fyri meg at fáa loyvi til at kava niður í stóra føroyska filmsarvin. Eg eri vorðin søgujunkie. Eg fái ikki ført eina samtalu uttan at snara hana inn á søguligar hendingar og gamlar filmar í rustaðum metaleskjum. Til mína verju, skal sigast, at eg havi inntikið eina ómetaliga stóra nøgd av hesum gomlu filmum upp á stutta tíð, tí eg havi bókstaviliga ligið undirgrivin í teimum frá morgni til myrkurs í skjótt eitt ár. Tað hevur riðið um snarið til eina yvirdosis fleiri ferðir.

Hóast eg eri vorðin filmsmisnýtari, so hevur arbeiðið eisini verið ómetaliga gevandi. Tað hevur verið ótrúliga stimbrandi at merkt tann stuðul, ið bæði fólk, feløg og virkir hava sýnt verkætlanini. Hundratals filmsrullur eru latnar inn, og allastaðni, eg havi spurt meg fyri, hava fólk verið sinnað at hjálpt á ein ella annan hátt.

Størsta gávan er tó tey sambond, ið eg havi fingið við øll tey mongu fólkini, sum hava hjálpt okkum við at gera Føroyskar Søgur til veruleika – ikki minst teir føroysku filmsundangongumenn, ið enn eru á lívi í dag, eitt nú Jákup Andreas Arge og Dánjal Jákup Mortensen. Føroyskar Søgur eru ognaðar hesum fólkum, ið gingu undan og av sínum einslistum filmaðu og skjalfestu, langt áðrenn nakar annar sá týdningini av hesum arbeiði. Tað er teimum fyri at takka, at vit í dag kunnu njóta Føroyskar Søgur.

*Uni L. Hansen, samskipari*